# Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna í Króki verður søkt eftir einum pedagogi 40. t. viku, at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 3.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara tlf. 225222/444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. januar 2006 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 19. desember 2005

**Fuglafjarðar býráð**

## Lærlingur til eykalutagoymsluna.

P/F Wenzel leggur stóran dent á kundanøgdsemi, og tí ynskja vit nærlagni og álit frá umsøkjarunum. Vit stilla stór krøv til starvsfólki, men kunnu tískil eisini veita eitt gott arbeiði undir skipaðum viðurskiftum og góðum arbeisumhvørvi, har tað eisini eru umráðandi, at starvsfólki trívist.

Førleikakrøv: FHS prógv og koyrikort til persónbil.

Møguligar umsóknir skulu verða okkum í hendi innan mánadagin 30. januar 2006.

Um tú ynskir eina framtíð saman við okkum, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn til

**P/F Wenzel**
**Postboks 3043**
**110 Tórshavn**
**Att: Oddmar Ørvarodd**

Eisini er møguligt at telduposta umsóknina til: oddmar@wenzel.fo

# Eysturoyingar

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 11. januar 2006**

**Tilmelding hjá:**
**Jari Lykke, tel 50 30 02**
**Ole Lykke, tel 220 972**



**Eysturoyar Teoriskúli**



## Djórahandilin søkir eftir starvsfólki

Persónurin, ið verður settur, skal hava vitan um og áhuga fyri djórum.

**Vit vænta at:**
- Tú ert minst 18 ár
- Tú ert vinarligur og fyrikomandi, kann vegleiða og selja til kundarnar aftan á upplæring
- Tú skalt vera skyldurøkin, møta til tíðina og kunna arbeiða sjálvstøðugt

Vasking av handlinum, umframt reingerð av akvarium og búrum er ein partur av starvinum

Arbeiðstíð: umleið 20 tímar um vikuna – við leygardagar. Arbeiðstíðin per viku kemur møguliga at økjast.

Umsóknir skulu verða skrivliga, og prógv hjálagt.

**Djórahandilin/Akvariubúðin**
Postboks 3274
110 Tórshavn

## Lærari til Eysturskúlan

Søkt verður lærara at byrja 1. februar 2006 og skúlaárið út.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Viðkomandi skal undirvísa í donskum í 6., 9. og 10 flokki. Kristni í 9. flokki. Søga í 6. og 9. flokki.

Meira fæst at vita um starvið frá skúlastjóranum Eyðdis Eidesgaard tel. 214752.

Skrivlig umsókn skal verða inni í seinasta lagi 23. januar 2006 og sendast formanninum í skúlastýrinum.

**Birita Krossteig**
Jónas Broncksgøta 33A
100 Tórshavn

*Skúlastýrið í Eysturskúlanum*

**Suðuroyar Sjúkrahús**

## Endurlýsing
# Ergoterapeutur

Vegna farloyvi verður søkt eftir ergoterapeuti til fulltíðarstarv í tíðini 1. februar. 2006 til 1. februar 2007.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at veita sjúklingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi og búfólkum á Ellis-& Røktarheiminum ergoterapeutiska tænastu.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið prógv sum ergoterapeutur. Eisini verður dentur lagdur á starvsroyndir.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og verða til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Somuleiðis skulu umsøkjarar tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er fysiurgiska deild á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Av tí at starvið eisini fevnir um búfólkini á Ellis- & Røktarheiminum, verður arbeitt har eftir tørvi. Viðkomandi hevur beinleiðis tilvísing til yvirfysioterapeutin.

**Løn og setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroyskir Ergoterapeutar.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til yvirfysioterapeutin tlf. 37 11 33 lokal 115.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**

Umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 23. januar 2006.

OILWIND
Pf. J. K. JOENSEN & SONUR

# Starvsfólk søkist

**til arbeiði uttanlands 2006**

Vit sóknast eftir nógvum dugnaligum fólkum til arbeiði uttanlands.

Vit søkja eftir maskinmeistarum, maskinsmiðjum, rørleggjarum ella fólki við royndum innan nevndu fak.

Upplýsing um arbeiði fáast við at venda sær til:

OILWIND
Pf. J. K. JOENSEN & SONUR

**370 Miðvágur**
Tlf. 332 442 • Fax 333 222
Ella skriva ein teldupost til jakup@oilwind.fo